# CREDO



Bólkurin, sum gjørdi come-back á Fjarðafestivalinum í fjør, verður aftur at síggja í ár.
Á Fjarðafestivalinum 2007 gjørdu Klaksvíkarbólkurin Credo comeback við eini rimmar konsert, sum veruliga vísti tað nýggja Credo. Aftur í ár er Credo við á festivalinum.

Bólkurin Credo bleiv stovnaður í 2003 av Leivi Vitalis, Hans Andriasi Olsen og Alvin Ellebye Andersen. Teir fingu tveir tónleikarar afturat sær, sum tó ikki eru við longur. Eftir at hava klárað seg væl til Gospel-prix, fóru teir undir at spæla konsertir javnan, og vóru teir væl dámdir. Mitt í 2005 byrjaði so at minka við konsertum, tí allir høvdu nógv at gera, og tað bleiv tí ikki nógv tíð til venjing og framførslur.
Í 2007 byrjaðu teir tó aftur.

Manningin í dag er: Hans Andrias Olsen - trummur, sang, Leivur Vitalis - bass, guittar, sang, Rógvi Sivertsen – guittar, Alvin Ellebye Andersen - keyboards, Guittar og programmering.

Les um og hoyr Credo á www.myspace.com/credofo ella á www.credo.fo

# T.O.S.



T.O.S. varð stovnað á sumri í 2008. Tó hava tríggir av limunum spælt saman sum bólkur fyrr, eitt nú til eitt tiltak í Siloa í Fuglafirði. Bárður, Jógvan Símun og Eiler spæla vanliga til møtir og ungdómsmøtir í Leirvík og kennast tí sera væl. John Eliasen er úr Fuglafirði og Jan Nónklett er av Glyvrum.
T.O.S. spælir tónleik, sum er ein vavstur av tónleikaligum íblástri úr øllum ættum. Bæði valsur og rokkur eru við øllum frá Santana til Jularbo.
Tekstirnir hjá T.O.S. spenna rættiliga víða, men eru allir grundaðir í kristindóminum, peikandi á Jesus Kristus. Evnini spenna frá lovsangi til sorgarsangir.



# Humble Cry

Millum bólkarnir, sum framføra á ársins Fjarðafestivali, verður eisini bólkurin við heitinum Humble Cry. Bólkurin bleiv settur á stovn í 2007, og í dag er bólkurin mannaður við Torkil Petersen - syngur og spælir á klaver, Jóhan Kristian Dam – bass, Ingmar Berg Mikkelsen - syngur , klaver og gittara, William Quinn Olsen Yngri – trummur.